Álit nov. 2014




# Normeringslykilin

Álit um normeringar

# Normeringar

**2014**


Normeringar ............ 2
Útrokningar fyrr ............ 2
Støðan í dag ............ 3
Hvørji atlit eiga at vera tikin? ............ 3
Uppskot til normeringar ............ 3
Hvat merkja postarnir ............ 4
Atlit í mun til fíggjarstýringina ............ 6
Veikleikar við lyklinum ............ 6
Okkara tilmælið ............ 7
Skjal 1 ............ 8
Skjal 2 ............ 9
Skjal 3 ............ 10

## Normeringar

Normeringar (tímajáttanir) hava leingi verið á breddanum, hvørt ár skulu fíggjarætlanir leggjast, og tá kemur evni upp at venda. Tí hvussu skulu tímar játtast soleiðis, at endamálið við stovninum verður rokkið?

Ógreið viðurskifti hava verið um normeringar í rúma tíð, og í størri mun eftir at dagstovnaøkið bleiv lagt út til kommunurnar at umsita. Áðrenn hetta var tað Almannaráðið/stýrið, ið sendi sítt umboð út til ein nýggjan stovn, og bleiv stovnurin normeraður saman við arbeiðseftirliti, brunaumsjón og landslæknanum. Eingin slík skipan finst í dag, og nakrar kommunur og stovnar gera broytingar í tímatalinum uttan góðkenning frá hægri myndugleika. Hetta ger, at ein ávísur ótryggleiki er um, hvussu stovnar og kommunur eiga at fyrihalda seg til normeringsspurningin.

**Arbeiðssetningurin** ljóðar: *Hvussu eigur ein normeringslykil at vera settur saman, soleiðis at tørvurin hjá barninum verður møttur. Viðmerkingar mugu eisini gerast til, hvussu fíggjarstýringin er skipað.*

Byrjað verður við einum parti, ið hevur til endamáls at lýsa verandi tímajáttanir kring landið. Eftir tað verður víst á ymisk atlit, ið hava týdning fyri tímajáttanirnar, og síðani kemur eitt uppskot til, hvussu tímajáttanin kundi verið útroknað.

Tímajáttanin (normeringin) er tengd at fíggjarætlanum og harvið fíggjarstýringini hjá einum stovni. Tí hava vit eisini nakrar hugleiðingar um, hvørji atlit vit halda eiga at vera havd í huga, tá fíggjarætlanir verða lagdar fyri stovnar.

Viðmerkjast skal, at tímajáttanarlykilin er útroknaður til vanligan tørv og ikki er settur í mun til børn, sum annars eru umfatað av grein 5 í lógini fyri dagstovnar og dagrøktir frá 10. mai 2000.

## Útrokningar fyrr

Áðrenn dagstovnarnir vóru yvirtiknir av kommununum, og meðan teir framvegis vórðu undir Almannaráðnum, var ein skipan galdandi, har umsitingin í Almannaráðnum tók avgerð um, hvussu játtanir skuldu roknast út. Umboð fyri almannaráðið fór út á hvønn einstakan stovn, og ein meting bleiv gjørd um tørvin hjá júst tí stovninum. Hvørji atlit vóru tikin, hava vit ikki funni upplýsingar um í dag.

Tó er komið fram á eitt vegleiðandi skjal[1], sum er vorðið til, tá trivnaðarnevndin hjá Løgtinginum seinni viðgjørdi dagstovnalógina - her eru bert tøl fyri vøggustovur og barnagarðar. Skjalið sigur einki um, hvussu leingi stovnurin hevur opið um dagarnar, hvar í landinum stovnurin er ella onnur viðurskifti. Skjalið er frá 1993, tá Føroyar framvegis vóru í djúpari kreppu. Tølini siga: 10 vøggustovubørn útloysa 100 tímar, harav 70 pedgaogtímar og 30 hjálparfólkatímar, og 10 barnagarðsbørn útloysa 50 tímar, 35 pedagogtímar og 15 hjálparfólkatímar. Umframt hetta eru 40 tímar til leiðara. Skjalið er viðfest sum skjal 1. Útfrá hesum er týðuligt, at talan er um ein fulltíðarleiðara til hvønn stovn, og at hesin ikki inngongur í útrokningini av tíðini til børnini.

Tá viðgerðin av dagstovnalógini var í apríl 2000, mælti Pedagogfelagið til ein annan útrokningarhátt[2]. 7 vøggustovubørn skuldu nú útloysa 80 tímar, og 7 barnagarðsbørn skuldu útloysa 40 starvsfólkatímar - 2/3 pedagogar og 1/3 hjálparfólk sum minstamark.

Hetta er tað, sum er skjalfest um normeringslyklar, tá dagstovnalógin bleiv smíðað. Hugsast kann tí, at framhaldandi arbeiðið og metingar eru gjørdar við hesum

[1] Sí skjal 1
[2] Sí skjal 2

tølunum í huga.

## Støðan í dag

Okkum vitandi er støðan eitt sindur ógreið í dag. Ymiskt er, hvussu stovnar eru normeraðir, og ymiskt er, hvørji viðurskifti spæla inn og beinleiðis hava ávirkan á, hvussu tímar verða játtaðir. Summar kommunur hava viljað at raðfesta dagstovnaøki høgt, meðan aðrar raðfesta økið lægri. Torført er hjá leikfólki at skilja, hvønn tørv stovnar hava, og hvat er neyðugt, og tískil er ikki altíð so lætt at tryggja, at stovnar fáa neyðugu tímarnar. Hetta í sær sjálvum reisir iva um, hvørt tímatillutingin er til barnsins besta. Flestu kommunur brúka tó tølini frá 1993 sum minstamark. Fleiri staðir eru tey farin at rokna leiðaratímarnar upp í vanligu normeringstølini. Hetta merkir sjálvandi, at tímar vera tiknir frá børnunum – tí illa ber til hjá leiðarum at innganga í tímaætlanina.

Kanningin hjá Føroya Pedagogfelag frá 2013 vísir, at støðan sum heild er hin sama kring landið - millum 10 og 11 tímar til vøggustovubørn og 5-6 tímar til barnagarðsbørn - tó so, at frítíðarheim/frítíðarskúlar hava eitt minkandi tímatal; her liggur tímatalið millum 2 og 5 tímar um vikuna. Tó er ógreitt, hvat tað eru fyri tilboð, sum hesir tímar umfata. Er talan um ein stovn, sum hevur opið í 9 ella 14 tímar, sæst ikki, hvussu feriuviðurskiftini ávirka o.s.fr.

Vit halda okkum kunna siga, at fleiri seta spurnartekin við normeringslykilin, tí tillagingar verða gjørdar, uttan at tað er gjøgnumskygt, hvussu tað er gjørt, ella hvørjar ætlanir liggja til grund fyri broytingunum.

## Hvørji atlit eiga at vera tikin?

Stóri spurningurin hevur leingi verið, hvussu komið er fram til hasi tølini, og hvat veruligi tørvurin á tímum er. Vit, sum manna arbeiðsbólkin, hava roynt at sett orð á, hvørji atlit eiga at vera tikin, tá ein normeringslykil verður settur saman. Hetta er gjørt við leiðarafundinum 2. september 2014 í huga, har fleiri viðmerkingar og hugskot vóru frammi:

- Stødd á stovni
- Hvussu stovnurin hevur opið
- Aldursbýtið á stovninum
- Karmarnir um stovnin/umhvørvið
- Staðsetingin - í bygdum øki ella við ein útjaðara
- Námsfrøðilig krøv
- Trygd og trivnaður hjá børnum og starvsfólkum

Illa ber til at fáa øll hesi viðurskifti við í ein normeringslykil, og hava vit tí skrivað onkrar viðmerkingar um, hvørji onnur atlit eiga at takast við, tá hugsað verður um játtanir til stovnar.

## Uppskot til normeringar

Fyri at kunna taka atlit til, at ymiskir stovnar hava opið ymiskar tíðir - úr 9 í 12 tímar um dagin, hava vit gjørt ein lykil, ið tekur støði í, hvussu tíðin kundi verið býtt upp - í fyrsta lagið í minuttir pr. tíma, soleiðis at tað síðani kann roknast út eftir, hvussu leingi ein stovnur hevur opið, tí sjálvandi krevjast fleiri tímar, tess longri ein stovnur hevur opið.

Samstundis er lykilin aldursuppbýtur og tekur støði í einum vanligum tørvi hjá einum barni. Hetta er vegna ymiskleikan í tørvinum, og tí at vit bæði fáa yngri børn inn,

og at forskúlarnir gera, at vit hava færri eldri børn inni. Fyri frítíðarheimini merkir tað møguliga eisini, at aldursbólkurin minkar til eisini at umfata tey 6 ára gomlu.

| | | | | Miðal | | | | | Miðal | | | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aldur | 0 | 1 | 2 | **VG** | 3 | 4 | 5 | 6 | **BG** | 7 | + | **Frtsk** |
| Tíð til barni m/t | 5 | 5 | 5 | **5** | 4 | 4 | 4 | 4 | **4** | 3,5 | 3,5 | 3,5 |
| Tíð til reinføri m/t | 3,1 | 3,1 | 3,1 | **3,1** | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | **0,5** | 0,4 | 0,4 | 0,4 |
| Tíð til mat m/t | 2,21 | 2,05 | 1,89 | **2,05** | 0,95 | 0,95 | 0,95 | 0,95 | **0,95** | 0,63 | 0,63 | 0,63 |
| Foreldrasamstarv m/t | 1,58 | 1,47 | 1,37 | **1,47** | 1,26 | 1,16 | 1,05 | 0,95 | **1,11** | 0,42 | 0,42 | 0,42 |
| Fyrireiking og eftirmeting | 2,13 | 2,13 | 2,13 | **2,13** | 2,13 | 2,13 | 2,13 | 2,13 | **2,13** | 2,13 | 2,13 | 2,13 |
| Praktisk viðurskiftið m/t | 0,5 | 0,5 | 0,5 | **0,5** | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | **0,5** | 0,5 | 0,5 | 0,5 |
| Stovnurin opin tímar | 9,5 | 9,5 | 9,5 | **9,5** | 9,5 | 9,5 | 9,5 | 9,5 | **9,5** | 5,0 | 5,0 | 5,0 |
| Minuttir um dagin | 138 | 135 | 133 | **135** | 88,7 | 87,8 | 86,7 | 85,8 | **87,3** | 37,9 | 37,9 | 37,9 |
| 1 tími á stovni um dagin útloysir tímar um vikuna: | 1,21 | 1,19 | 1,17 | 1,19 | 0,78 | 0,77 | 0,76 | 0,75 | 0,77 | 0,63 | 0,63 | 0,63 |
| Tímar um vikuna | 11,5 | 11,3 | 11,1 | **11,3** | 7,4 | 7,3 | 7,2 | 7,1 | **7,27** | 3,2 | 3,2 | 3,16 |

**m/t merkir minnutir um tíman.**

Leiðarin er ikki íroknaður tíðina til børnini, og verður hetta viðmerkt í partinum um fíggjarstýringina.

Her ber til at síggja, hvussu nógvir tímar skulu setast av til hvørt barnið um vikuna, t.d. 11,5 tímar um vikuna til vøggustovubarn undir 1 ár, um stovnurin hevur opið í 9,5 tímar. Eisini ber til at síggja, hvussu nógv 1 tími um dagin ella 5 tímar um vikuna útloysa – sama barn gevur 1,2 tímar um vikuna. Lykilin kann sostat tillagast upplatingartíðunum á stovninum umframt broytingar í aldurssamansetingini. Nøkur hugsað dømi eru viðfest álitinum[3].

## Hvat merkja postarnir

**Tíð til barnið**: í hesum liggur dagliga arbeiðið í mun til barnið ella barnabólkin, t.d. tað kreativa, spæl, túrar og samskifti við barnið ella barnabólkin. Ella sum tað stendur í lógini fyri dagstovnar og dagrøktir, grein 2: *Við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling, at menna barnanna andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði, at búgva børnini til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldu í einum fólkaræðisligum samfelag, at menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti til at styrkja teirra samleika, sjálvsvirði, sjálvskenslu og evni til at taka sær av egnum viðurskiftum á ein friðarligan og samstarvandi hátt, at tryggja børnunum eitt heilsugott og rørsluliga stimbrandi umhvørvi innandura og við uttanumøki, sum hóskar til barnsins aldur og førleika, í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í tøttum samspæli við náttúruna.*

**Tíð til reinføri**: í hesum liggur m.a. dagliga arbeiðið í sambandi við reinførið hjá barninum. At skifta blæur, hjálpa til, tá ið barnið fer á vesi, vaska hendur, hjálpa barninum at skifta klæði, vegleiða í mun til at lata seg í eftir veðrinum, og annars at

[3] Sí skjal 3

halda skil á klæðum og øðrum hjá einstaka barninum. Reingerð og uppvask aftaná máltíðir, at vaska klæðir hjá stovninum og at skifta á vognunum.

**Tíð til mat**: í hesum liggur dagliga arbeiðið í sambandi við máltíðirnar á stovninum. At skera frukt, fyrireika máltíðina á miðdegi, fyrireika millummála og at vera saman við børnunum og vegleiða/hjálpa í sambandi við máltíðirnar. Umframt at fylgja við, hvussu nógv børn eta ella, at tey eta.

**Foreldrasamstarv:** Í hesum liggur samstarvið við foreldrini, sum er ein týðandi partur av tí pedagogiska arbeiðinum.
Hetta byrjar við tí fyrstu samtaluni, áðrenn barnið byrjar á stovninum. Tað er umráðandi at skapa eitt trygt og opið samskifti við foreldrini, við viðring fyri øllum pørtum. Fyri at barnið skal trívast og mennast á stovninum, er tað alneyðugt at foreldrini eru trygg við tey vaksnu á stovuni. Fyri at barnið skal fáa eina góða byrjan, má tíð setast av at tosa við foreldrini, tá barnið byrjar á stovninum.
Tá so barnið er byrja, skal tíð vera til at taka ordiliga ímóti barninum um morgunin, so foreldrini kenna, at tey trygt kunnu fara til arbeiðis, og barnið er í góðum hondum. Tá so barnið aftur verður heintað, skal tíð eisini vera at samskifta um, hvussu dagurin hevur verið. Áðrenn barnið dugir at tosa, er tað umráðandi, at tann vaksni setur orð á dagin fyri barnið.
Fyri at røkka endamálinum í dagstovnalógini § 2, har tað stendur*: saman við foreldrunum at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling,* er tað umráðandi, at samstarvið er so gott, at um okkurt er, skal pláss vera fyri, at foreldrini kunnu koma beinanvegin og siga frá. Hinvegin skulu tey vaksnu á stovuni eisini siga frá, um okkurt er, sum tosað eigur at vera um, so møguleiki er at fyribyrgja.
Árliga skal foreldrafundur vera, har greitt verður frá tí pedagogiska arbeiðnum á stovuni/stovninum.
Eisini eiga árligar foreldraviðtalur at vera, har fokus er á tað einstaka barnið, sum stovan og foreldrini samskifta um. Tá skal eisini farast meira í dýbdina viðvíkjandi trivnaðinum og menningini hjá barninum, og hvussu stovnurin sær barnið, og hvussu foreldrini uppliva tað.

**Fyrireiking og eftirmeting:** Í hesum liggur bæði fyrireiking, fundir og eygleiðingar av einstaka barninum. Her verður ikki hugsað um tær skipaðu eygleiðingarnar í mun til onkra kanning ella líknandi.
Um endamálið í dagstovnalógini §2 skal røkkast, er neyðugt at eygleiða tað einstaka barnið, fyrireika gerðandisdagin, fylgja og eftirmeta menningina.
Tíðin verður nýtt til at eygleiða hvørt einstakt barn og síðani at fyrireika gerðandisdagin soleiðis, at barnið kann menna sínar fjølbroyttu førleikar, andsfrælsi, tollyndi, fólkaræði, sjálvsvirði, sjálvskenslu v.m. Tað er sera umráðandi, at hvørt barnið fær røttu avbjóðingarnar, um ein sunn og góð menning skal halda fram. Eisini verður tíðin nýtt til at kanna møguleikarnar fyri, at børnini kunnu fáa øðrvísið upplivingar enn heima, t.d at vitja ymisk virki, bøndur, politi- brandstøð o.a. Tíðin til eftirmeting verður nýtt til at viðgera menningina hjá barninum. Hvørjar avbjóðingar barnið skal fáa framyvir, hvussu tað hevur ment seg, og hvørjar avbjóðingar skulu fyrireikast ella tillagast.
Fyri at hetta skal bera til, skal rúm vera fyri, at fundir og samtalur eru møguligar.

**Praktisk viðurskiftið:** Fyri at fáa eina stovu at fungera optimalt, er nógv praktiskt, sum skal gerast. Tá máltíðirnar eru, skal mjók t.d. heintast, setast á borðið og takast av borðinum, setast skal í uppvaskinmaskinuna, og hon skal eisini tømast. Á stovnum, har onki køksfólk er, skal millummáli gerast.

Tá virksemi er, skal tilfar heintast og ruddast vekk.
Stovan skal eisini haldast ruddilig og hugnalig í tí dagliga. Spøl og leikur skulu vera nøkulunda uppá pláss, soleiðis at tað er atkomuligt hjá børnunum og starvsfólkunum. Tá stovan verður stongd fyri dagin, eigur at vera rúm fyri, at tað verður gjørt klárt til reingerð.

## Atlit í mun til fíggjarstýringina

Ein normeringslykil er eitt amboð til at leggja tímar inn í ein stovn, soleiðis at vanlig námsfrøðilig mál og mið, sum víst verður á í lógini fyri dagstovnar og dagrøktir frá mai 2000, verða rokkin. Lykilin tekur ikki hædd fyri serligum viðurskiftum, serligum stovnum ella serligum ætlanum.

Lykilin tekur heldur ikki hædd fyri stødd á stovni, tí minni ein stovnur er, verri er at fáa tímarnar at røkka, soleiðis at trygd, trivnaður og fyribyrging av vandastøðum eru tryggjað.

Tað riggar illa at leggja leiðaran inn í tímatalvuna, hetta millum annað vegna leiklutin, sum ein leiðari hevur, og eisini vegna ta órógv, sum fylgir við flestu leiðarum. Leiðarar eiga at vera tøkir til samtalur við foreldur, myndugleikar, serráðgeving og annað. Samstundis eiga leiðarar at vera til reiðar at geva ráð og vísa á skilagóðar námsfrøðiligar leiðir.

Tá tímar verða tillutaðar einum stovni, má hugsast, at tímarnir bert verða "dagførdir" einaferð um árið - hetta fyri at sleppa undan at skula siga fólki úr starvi fyri stutt eftir aftur at skula lýsa eftir fólki. Ein ávís lagaligheit eigur at vera í játtanini, og eitt neyvt samskifti eigur at vera millum kommunalu myndugleikarnar og leiðsluna á stovninum. Hetta merkir, at óvæntaðar broytingar, so sum at børn gevast á stovninum í úrtíð, ikki eigur at fáa avleiðingar fyri stovnin beinavegin, men hyggjast skal eftir, um hetta er ein varandi broyting í barnatalinum. Sjálvandi skal ein fíggjarætlan tillagast varandi broytingum. Tímarnir mugu somuleiðis játtast soleiðis, at hædd verður tikin fyri veruligu lønarútreiðslunum og ikki í onkrum miðaltali. Við einum miðaltali verða stovnar við starvsfólkum við høgum starvsaldri revsaðir, meðan stovnar við starvsfólkum við lægri starvaldri fáa ágóðan.

Sum nevnt mugu atlit somuleiðis takast til hvønn einstakan stovn sær. Sovorðið sum oljunýtsla, el-nýtsla og møguligar aðrar umstøður krevja, at hvør stovnur verður viðgjørdur serstakt.

Vit mæla til at skilja játtanina til lønir frá játtanini til rakstur, samstundis sum hvør stovnur verður viðgjørdur fyri seg - heldur enn, sum miðaltøl. Hetta skuldi veri útreiðsluneutralt fyri kommunurnar, tó at tað møguliga krevur meira arbeiði hjá leiðslum og umsitingum.

## Veikleikar við lyklinum

Veikleikin við at játta ávíst tímatal og halda seg fast at hesum, kemur serliga til sjóndar, tá stovnar gerast lítlir, ella tá karmarnir eru serligir. Einhvør skipan eigur at taka hædd fyri sovorðnum sum trygd, trivnaði og fyribyrging. Hava stovnar fá børn, eiga fyriskipanir og tímar at verða játtaðir soleiðis, at starvsfólk ongantíð eru einsamøll við

børnum. Her skal hugsast um møguligar avleiðingar av óhappum, bæði hjá børnum og hjá starvsfólkum - tá má altíð vera møguleiki fyri at fáa hjálp frá øðrum starvsfólkum á staðnum. Eisini má hædd takast fyri at fyribyrgja óhepnar støður orsakað av vantandi eftirliti, so møguleikin fyri, at børn kunnu verða fyri ágangi av ein hvørjum, slagið ikki skal koma fyri.

## Okkara tilmælið

Vit mæla til, at okkara uppskot til normering (tímajáttan) verður tikið til eftirtektar, at leiðslutímar ikki vera blandaðir við normeringina (tímajáttanina).

Hetta vil vera við til at gera tað týðuligari, hvussu arbeiðstíðin er gjørd upp, at fyribyrgja misskiljingar og harvið fækka um møguligar misskiljingar, ið kunnu vera um, hvat arbeiðstíðin inniheldur, og hvørjar uppgávur liggja innan givnu karmar.

Vit mugu eisini mæla til, at fíggjarligu karmarnir verða javnt meira støðufastir – at fíggjarligu karmarnir og umstøðurnar verða lagdar fyri eitt ár ella fleiri í senn, soleiðis at merkja, at tað ikki gongur út yvir normeringina (tímajáttanina) í somu løtu, at barnatalið minkar. Atlit eiga at vera tikin til at kunna varveita ein støðugan starvsfólkabólk.

Vit mæla somuleiðis til, at hædd verður tikin fyri støðd og umstøðum annars hjá stovnum, tá fíggjarætlanir vera lagdar - her hugsað soleiðis, at eingin stovnur eigur at kenna seg noyddan at tilrættisleggja arbeiðstíðina soleiðis, at fólk eru einsamøll til arbeiðis, tí tá er vandi fyri, at óhapp kunnu gerast størri og vandamiklari – umframt at vandin eru størri fyri ákærum um ella fremjan av ymiskum ágangi móti børnum.

Vit minna á, at hædd er ikki tikin fyri serligum skipanum fyri børnum við serligum avbjóðingum, ið vit meta altíð eiga at vera viðgjørd fyri seg og við atliti til tann tørvin, tey hava.

Arbeiðsbólkurin hjá Føroya Pedagogfelag 26. november 2014.

Maja Højsted, leiðari, Klaksvík.

Mirjam Kjølbro, leiðari, Miðvági.

Jóna Guttesen, leiðari, Tórshavn.

Jógvan Philbrow, leiðari, Kambsdalur.

**Skjal 1**

# Nevndarskjøl trivnaðarnevndin 1999

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 29/1999

## 29 Uppskot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

## Skjal T

Normeringslykilin ið Almannastovan hevur gjørt í 1993.

### Starvsfólkanormering

Navn á stovni

| | |
|---|---|
| **Standard nomering til barnagarðar & vøggustovur** | |

| **Barnatal/barnag.** | **Pedagogtímar** | **Hjálapafl.tímar** | **Leiðaratímar** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|
| 10 | 70 | 30 | 40 | 100 |

| **Barnatal/vøggust.** | **Pedagogtímar** | **Hjálapafl.tímar** | **Leiðaratímar** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|
| 10 | 70 | 30 | 40 | 100 |

| **Barnagarður** | | | | | **Vøggustova** | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | |
| Útroknað í pedagogtímar | | | 35 | | Útroknað í pedagogtímar | | | 70 |
| | | | | | | | | |
| Útroknað í hjálpartímar | | | 15 | | Útroknað í hjálpartímar | | | 30 |
| | | | | | | | | |
| **Tilsamans** | | | 50 | | **Tilsamans** | | | 100 |
| | | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| **Normering tilsamans** | | | | | **Starvsfólkatal** | | | |
| | | | | | | | | |
| Pedagogtímar | | | 105 | | Pedagogar | | | 2,63 |
| | | | | | | | | |
| Hjálpartímar | | | 45 | | Hjálparfólk | | | 1,13 |
| | | | | | | | | |
| Leiðaratímar | | | 40 | | Leiðari | | | 1,00 |
| | | | | | | | | |
| **Norm. tilsamans** | | | **190** | | **Starvsfólk tils.** | | | **4,75** |
| | | | | | | | | |

**Skjal 2**

# Nevndarskjøl trivnaðarnevndin 1999

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 29/1999

## Uppskot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

## Skjal Å

Innkomið 04.04.2000

FØROYA PEDAGOG FELAG

Tórshavn 03/04-2000

**Viðvíkjandi starvsfólkanormering.**

Føroya Pedagogfelag hevur í uppskoti hesa starvsfólkanormering sum eitt minsta mark:

- 7 barnagarðsbørn 40 starvsfólkatímar
- 7 vøggustovubørn 80 starvsfólkatímar

Eitt dømi: ein barnagarðstova við 21 børnum gevur 120 starvsfólkatímar ella 3 fulltíðar sett starvsfólk, herav 2/3 pedagogtímar og 1/3 hjálparfólkatímar.

Uppskotið um normeringum er gjørd út frá tí, sum er galdandi í dag. Tann normering, sum varð gjørd í 1993 er gjørd sum eitt minsta mark, tá ið tíðirnar vóru av tí ringasta í Føroyum.

Starvsfólkanormeringin er gjørd í mun til barnatalið, haraftrat er altíð ein leiðari settur at arbeiða fulla tíð.

Um barnagarðar hava longri opið enn vanligt, tí tørvur er á tíð, t.d. um børnini eru leingi á barnagørðum tí foreldrini arbeiða langt burturi, so verður í sovorðnum førum sett eyka starvsfólkatímar, somuleiðis um teir fysisku karmarnir ikki eru í lagi.

Umframt hesa normering, verður reingerðarfólk sett í mun til støddina á bbarnagarðinum og ofta verður eisini húsavørður settur.

Vinarliga

v.f.

Carita Björklund

## Skjal 3

**Nøkur dømi:**
10 vøggustovubørnum, sum í aldri eru javnt býtt millum 0 og 2 ár, opið um 9,5 tímar um dagin, skuldu útloyst umleið:

4 børn 0 ár x 11,1 tímar um vikuna = 44,40 tímar.
3 børn 1 ár x 10,9 tímar um vikuna = 32,66 tímar.
3 børn 2 ár x 10,7 tímar um vikuna = 32,04 tímar.
Ella tilsamans: **109,1 tímar.**

Munurin millum hetta og verandi lykar er 10 vøggustovubørn x 10,5 = 105 tímar, ella 4,1 tímar færri. Ella hevði tað givið 110 tímar við lykilinum 11 tímar pr. barn ella 0,9 tímar færri inni á stovuni.

Við 10 barnagarðsbørnum hevði úrslitið sæð soleiðis út:
3 børn 3 ár x 7,4 tímar um vikuna = 22,18 tímar.
3 børn 4 ár x 7,3 tímar um vikuna = 21,95 tímar.
2 børn 5 ár x 7,2 tímar um vikuna = 14,46 tímar.
2 børn 6 ár x 7,1 tímar um vikuna = 14,30 tímar.
Ella tilsamans **72,90 tímar.**

Munurin millum hetta og verandi lyklar er 5,5 x 10 barnagarðsbørn = 55 tímar, ella 17,9 tímar fleiri. Ella við lyklinum 6 tímar x 10 barnagarðsbørn =60 tímar, 12,9 tímar fleiri.

30 frítíðarheimsbørn (1. og 2. fl.), býtt javnt millum 7 og 8 ár skuldu, tá opið er 5 tímar um dagin, útloyst umleið:
15 børn 7 ár x 2,9 tímar um vikuna = 43,31 tímar.
15 børn 8 ár x 2,9 tímar um vikuna = 43,31 tímar.
Ella tilsamans: **86,63 tímar.**

Munurin millum hetta og verandi lykar er 30 frítíðarheimsbørn x 2,4 = 72 tímar, ella 14,63 tímar færri. Ella hevði tað givið 96 tímar ella 10,6 tímar færri inni á stovninum við lyklinum 3,2 tímar pr. barn

---

**Útrokningar háttur:**
Tal av børnum 0 ár (falda) 1,17 (1 tími á stovni um dagin útloysir tímar um vikuna)(falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Tal av børnum 1 ár (falda) 1,15 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Tal av børnum 2 ár (falda) 1,12 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Samantalt gevur samlað tímatal, ein vøggustova kundi hugsast at havt um vikuna.
Tal av børnum 3 ár (falda) 0,78 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Tal av børnum 4 ár (falda) 0,77 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Tal av børnum 5 ár (falda) 0,76 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Tal av børnum 6 ár (falda) 0,75(falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Samantalt gevur samlað tímatal, ein barnagarður kundi hugsast at havt um vikuna.
Tal av børnum 7 ár (falda) 0,58 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Tal av børnum 8 ár (falda) 0,58 (falda) tímar stovnurin hevur opið = eitt tímatal.
Samantalt gevur samlað tímatal, eitt frítíðarheim kundi hugsast at havt um vikuna.